# Kunningar- og samskiftisfólk

Eitt hálvtíðarstarv innan kunning og samskifti er leyst at søkja til setan frá 1. oktober ella skjótast til ber. Arbeiðsstaður er setursskrivstovan, men arbeiðsuppgávurnar fevna um alt Fróðskaparsetrið.

**Arbeiðsuppgávur**
Tann, ið verður settur í starv, skal m.a.:
- gera upplýsandi tilfar um Setrið til almenning og studentar innan- og uttanlands
- skipa fyri tiltøkum av ymsum slag

Størsti denturin verður lagdur á at gera tilfar til og røkja heimasíðu okkara.

**Førleikakrøv**
- Útbúgving innan kunning, marknaðarføring, journalistikk ella góðar royndir innan tílíkt arbeiði
- Skal duga væl at skriva á føroyskum, donskum og enskum
- Skal hava royndir í heimasíðuforritan
- Skal vera skapandi, duga at taka ímóti hugskotum og fremja tey í verki
- Skal hava evni at samstarva tvørfakliga

**Setanartreytir**
Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Føroya Landsstýri og avvarðandi yrkisfelag. Fyrsta ár er royndarár.

Umsókn við yvirliti yvir starvsroyndir, avriti av prógvum og møguligum viðmælum skulu stílast til setursskrivaran og vera Fróðskaparsetrinum í hendi innan 15. september 2000. Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Setursskrivstovuna tlf. 31 53 02.

**Fróðskaparsetur Føroya**
Setursskrivstovan
Handan Á 5
100 Tórshavn
annikajo@fsf.fo
www.sleipnir.fo/setur

# ÚTBJÓÐING

Vegna Vestmanna kommunu verður arbeiðið at leggja nýggja vatnleiðing, uml. 3.500 m, frá Bjarnadalsá, til útlíkningarbrunn við Gjógvará, boðið út í almenna lisitatión. Arbeiðið verður boðið út í høvuðsarbeiðstøku, ið umfatar jørðarbeiði og rørarbeiði.

Arbeiðið er ætlað at byrja í oktober 2000.

Lisitatión verður mánadagin 25. september 2000 kl. 14.00 á skrivstovuni hjá Vestmanna kommunu.

Útbjóðingartilfarið kann bíleggjast í seinasta lagi týsdagin 5. september 2000 við at flyta kr. 2.000 á konto nr. 151.845-2 í Føroya Sparikassa. Veðhaldið verður afturgoldið, tá útbjóðingartilfarið er aftursent óskatt í seinasta lagi eina viku eftir lisitatiónina.

**Pf. Sofus M. Jakobsen**
**Ráðgevandi verkfrøðingar F.R.I.**
J.H. Schrøtersgøta 22, 100 Tórshavn
Tlf. 313522, Fax 310622

Toll- og Skattstova Føroya,
Eysturoyar Øki

# Starv í Toll- og Skattstovu Føroya, Eysturoyar Øki

Á Toll- og Skattstovu Føroya, Eysturoyar Øki er starv sum avloysari leyst at søkja fyri skrivstovufólk í farloyvi, frá 01. oktober 2000 til 31. mars 2001.

**Arbeiðsuppgávur**
Eftirlitsarbeiði innan toll, mvg, skatt o.a.

**Førleikakrøv**
Tann, sum settur verður, skal helst hava merkonomútbúgving ella líknandi, vera arbeiðssamur, fyrikomandi, kunna arbeiða sjálvstøðugt og skal vera førur fyri at mynda avgerðir í dagliga arbeiðinum.

**Setanartreytir**
Løn- og setanarviðurskifti eru eftir sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið.

**Umsóknir**
Skrivlig umsókn saman við avriti av prógvum, ummælum og upplýsingum um starvsroyndir skulu sendast til Toll- og Skattstovu Føroya, Eysturoyar Øki, Postboks 225, 600 Saltangará **innan 16. september 2000.**

**Toll- og Skattstova Føroya**
Eysturoyar Øki
Postboks 225
FO-600 Saltangará

***Um stovnin***
*Toll og Skattstova Føroya er stovnur undir Fíggjarmálastýrinum, hvørs uppgáva er at fyrisita toll-, avgjalds-, mvg-, inntøkuskattalógina og alla skuldarinnkrevjing hjá landinum. Stovnurin hevur 150 starvsfólk og er skipaður soleiðis, at planlegging og menning fer fram í Stýrinum á Argjum. Tær seks økisskrivstovurnar, ið eru á Tvøroyri, í Skopun, Sørvági, Saltangará, Klaksvík og í Tórshavn, røkja raksturin. Í Eysturoyar Øki, har viðkomandi kemur at starvast, starvast 16 fólk.*

# Assistentur (hjálparfólk)

Blákrossheimið, Lynggøta 12, søkir eftir assistenti (hjálparfólki) fulla tíð til avrúsingina, at seta sum skjótast.

Arbeiðið umfatar fyrst og fremst at vera í móttøkuni og vera um búfólk, sum eru í avrúsingini.

Arbeiðstíðir: Skiftandi vaktir.

Lønar- og setanarviðurskifti sambært sáttmála hjá Starvsmannafelagnum og Bláakross Føroya.

Umsókn við avriti av prógvi og møguligum viðmælum skulu vera stovninum í hendi í seinasta lagi 15. september 2000.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til:

**Blákrossheimið**
Sólborg Dulavík
Lynggøta 12
FO-100 Tórshavn

Fiskimálastýrið
Fiskivinnustovan

# Starv sum fulltrúi á Fiskivinnustovuni

Søkt verður eftir einum fulltrúa til Fiskivinnustovuna.

Fulltrúin skal saman við leiðslu og øðrum fulltrúum í Fiskimálastýrinum serliga arbeiða við fiskiídnaðarmálum og fiskivinnuroyndum, herundir samskipa leiklutin hjá Fiskimálastýrinum í verkætlanum innan fiskivinnugransking. Møguligar broytingar í virkisøkinum kunnu verða gjørdar.

Tað verður sett sum krav, at umsøkjarar hava viðkomandi útbúgving frá hægri lærustovni. Harumframt er tað eitt krav, at umsøkjarar hava góðan kunnleika til føroyskt og enskt mál. Grundleggjandi royndir innan virkisøkini verður roknað sum ein fyrimunur.

Umsøkjarar eiga at vera samstarvsfúsir, at vera til reiðar at royna nýggjar avbjóðingar, at kunna virka til lítar og á ein tryggan hátt í einum umhvørvi, har mál til tíðir hava nógvan skund.

Setanarøkið er Fiskimálastýrið og deildir í stýrinum, umframt onnur aðalstýri og løgmansskrivstovan.

Setanartreytir og løn verða sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og avvarðandi yrkisfelag.

Fyrispurningar starvinum viðvíkjandi kunnu setast Andras Kristiansen, deildarstjóra á telefon 353030.

Umsóknir við prógvum og viðmælum skulu verða sendar Fiskivinnustovuni, Yviri við Strond 17, Postrúm 347, 110 Tórshavn og skulu vera Fiskivinnustovuni í hendi í seinasta lagi mánadagin 25. september 2000, kl. 16.00.

# Reingerðarfólk

Søkt verður eftir fólki at gera reint á Føroya Skúlabókagrunni 4 dagar um vikuna aftan á vanliga arbeiðstíð, 10 tímar til samans, frá 1. okober 2000.

Løn sambært sáttmála.

Umsókn verður at senda til grunnin í seinasta lagi mánadagin 18. september 2000.

Meira fæst at vita við at venda sær til grunnin.

*Tórshavn 23. august 2000.*
**Føroya Skúlabókagrunnur**
Lützenstrøð 4 · 100 Tórshavn
Telefon 31 61 00 · Telefax 31 87 26

*Lýsið í* **sosialinum**



# Starvsfólk til Dagrøktina í Runavíkar Kommunu

Søkt verður eftir einum starvsfólki til Kommunalu Dagrøktina í Runavíkar Kommunu at arbeiða 30 tímar um vikuna.

Í Dagrøktarskipanini eru 90 børn og 20 dagrøktarmammur.

Vit ynskja, at tú ert kreativur, hevur góð samstarvsevnir og hevur hug at arbeiða við børnum. Arbeiðið verður í størstan mun skipað út frá spælistovuni.

Nærri upplýsingar starvinum viðvíkjandi fáast frá dagrøktarleiðaranum á tlf. 448594.

Skrivlig umsókn skal vera Dagrøktini í hendi í seinasta lagi 12/09-2000.

**Dagrøktarskipanin í Runavíkar Kommunu**
Heiðavegur
600 Saltangará

Kósin seafood

# Kósin Seafood søkir seljara

Vit sóknast eftir seljara at byrja skjótast tilber.

**Arbeiðið fevnir um:**
- Sølu av frystum og saltaðum fiskavørum
- Samstarv við innkeypara, virkis- og góðskuleiðara
- Marknaðarførðslu

**Førleikakrøv:**
- Góð samstarvsevni og mennandi hugsunarhátt
- At arbeiða sjálvstøðugt
- Skal kunna arbeiða undir tíðartrýsti
- Góðan kunnleika til enskt
- Góðan kunnleika til Word, Excel og PowerPoint

**Fyrimunir:**
- Arbeiðsroyndir innan fiskivinnu og sølu
- Kunnleiki til franskt/spanskt/italienskt
- Kunnleiki til Navision

**Løn:**
Løn eftir avtalu

**Umsókn:**
Umsókn við møguligum prógvum og viðmælum verður at senda innan 15/09-2000 til:

Kósin Seafood
Postrúm 290
FO-700 Klaksvík
Att.: Hanus Hansen

Um Kósin Seafood: Kósin Seafood er framleiðsluvirkið av frystum og saltaðumfiskavørum til catering og industri kundar. Útflutt verður til UK, USA, Spaniu, Italiu, Frakland og Týskland. Á Kósin Seafood starvast uml. 200 fólk.

# Frá 1000 ára haldinum

Leygardagin 2. september kl. 17 heldur Johs. Andr. Næs fyrilestur um kristni undirvísing í skúlaverkinum í Christianskirkjuni í Klaksvík (kirkjukjallaranum).

**FØROYAR KRISTNAR Í 1000 ÁR**
Postboks 1121 · tlf. +298 321132 · fax +298 321761 · FO-110 Tórshavn

Føroya største úrval av

# PAKKITILFARI

**úr karton, bylgjupapp og plast innan øll vinnuøkir**

Vit útvega eisini:
- **Plastbakkar**
- **Pakkibond, tape**
- **Merkir, etikettir**
- **Knívar**
- **Kitlar, húgvur, handskar, svintur o.l.**
- **Ymisk tól til ídnaðin**
- **Reingerðisevnir**
- **Tilsetningsevnir**
- **Plattar**
- **Ráðgeving í tilevning av pakkitilfari**

*...sjálvandi til besta prísin!!*

**FARPACK**
*Staravegur 5, P.O. Box 3099*
*FO-110 Tórshavn*
*Telefon +298 35 30 00*
*Fax +298 35 30 10*
*E-mail: farpack@farpack.com*

**GEVIÐ BLÓÐ**

# Lær zoneterapi!

**Et vidunderlig yrke.**
**Nytt kurs tilbys fra høsten.**

Utdannelsen består av:
200 timers undervisning i praktisk fotzoneterapi, anatomi/fysiologi, alternativ sykdomslære, øreakupunktur samt ernæringslære.
Eksamen i juni 2001.

Kurset avvikles med en intensivweekend pr. mnd. og er meget intensivt opplagt og fører fram til soneterapi på profesjonellt nivå og er godkjent av Samband for Alternative Behandlere i Danmark og Norsk Forening for Soneterapeuter m.m.

Undervisningen følger den kjente danske zoneterapeut Lilian Holst's (skolens leder) anerkjente undervisningsopplegg og gis av lærer med over 30 års undervisningserfaring og mange års stor erfaring fra egen klinikk. Undervisningen og lærebøker er på meget lettfattelig skandinavisk.

Ring eller skriv etter kursprogram.

Kursstart 16. sept.

**Vestegnens Zoneterapeutskole, Danmark**
Repr. for Færøyene:
Føroya Natúrmedisinska Klinikk
Sundsvegur 10, FO-100 Tórshavn
Telefon: (298) 32 03 95
kl. 09–11 og kl. 19–21 hver dag
Fax hele døgnet: (298) 32 03 96

# Til sølu

Tvey grundstykkir til dupulthús, matr. nr. 50u og 50v við Stoksoyravegin, 700 Klaksvík.

**Tlf. 456532 - 216532**

# Dramalsjónleikarskeið fyri ung og vaksin

Á Dramaverkstaðnum á Hálsi í Havn, Hallarheygur 2, verða fleiri skeið í drama og sjónleiki fyri ung og vaksin. Byrjað verður miðskeiðis í sept. og hildið fram til mai 2001.Undirvíst verður í ymiskum lærugreinum sum geva innlit og hegni í sjónleikarlist t.d.:

- Ymiskar venjingar í konsentratión
- Javnvágsvenjingar
- Kensluvenjingar
- Spøl
- Avspenning
- Andadráttsvenjingar
- Røddvenjingar og annað
- Improvisatión, tað er at gera ófyrireikaðar framførslur antin frítt ella við bundnum uppgávum
- Venjing í at leika sjónleik, t.d. venja ymisk stutt brot úr sjónleikum
- Teatersport
- Forumleik

Gleðin við at arbeiða við drama og sjónleiki er fremst í huganum, og har kunnu øll fáa okkurt burturúr. Ein kann siga hetta arbeiði er bæði til gaman og álvara.
Børn: Fyri alt skeiðið 1500,-
Tey yvir 14 ár eru undir Kvøld- og Ungdómsskúlanum.
**NB:Tey yngstu skulu vera fylt 9 ár áðrenn 01.09.00**

**Byrjarir:**
9 til 12 ár (1989 – 1991 ) Týsdag kl. 15.00 til 16.45.

**Byrjarir/ Eitt sindur roynd:**
9 til 12 ár (1989 – 1991 ) Mánadag kl. 15.00 til 16.45.
12 til 14 ár (1986 – 1989 ) Hósdag kl. 15.30 til 17.15.
14 ár og eldri (1986 og eldri ) Fríggjadag kl. 16.00 til 18.00.

**Byrjarir/Roynd:**
16 ár og eldri (1983 og eldri ) Hósdag kl. 17.30 til 20.30.

**Nógv roynd (framhaldsbólkar):**
11 til 13 ár (1987 – 1989 ) Mánadag kl. 17.00 til 19.00.
11 til 13 ár (1987 – 1989 ) Týsdag kl. 17.00 til 19.00.
14 til 18 ár (1982 – 1986 ) Mikudag kl. 17.00 til 19.30.

Tilmelding:
Tlf. 31 60 28 millum 16.00 og 18.00.

**Barnasjónleikarfelagið • Dramaverkstaðið**
Hallarheygur 2, FO 100 Tórshavn • Tlf. 31 60 28 31 19 83 • e-mail:hjck@post.olivant.fo
http://kort.olivant.fo/~hjck/

Sosialurin - 311820



# Móttøka

Í sambandi við at

**Birita Krossteig**

verður sett sum dagligur leiðari í Sjónleikarhúsinum verður móttøka í húsinum

**fríggjadagin 1. september kl. 14–16.**

Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Havnar Sjónleikarfelag**

**Lesið sosialin**